GLASIR
TÓRSHAVN COLLEGE

# Vegleiðing til BV3 og BV2

# 2024-25

# Innihald

**Vegleiðing til breytarverkætlanina (BV3/BV2)....2**
Endamálsorðing í kunngerðini....2
Uppgávustødd....2
Vegleiðingin....2
Meting....3
Innihald í uppgávuni....3
Forsíða og heiti....4
Úrtak/"Abstract"....4
Innihaldsyvirlit....4
Inngangur....4
Viðgerð av uppgávuorðingini og spurningum....4
Niðurstøða....5
Keldutilfar og ávísingar....5
Endurgevingar....5
Myndir....6
Keldu- og bókmentalisti....6
Bókmentalisti - dømi:....6
Áðrenn tú letur inn....6
Tíðarætlan (í høvuðsheitum)....6

GLASIR
TÓRSHAVN COLLEGE

# Vegleiðing til breytarverkætlanina (BV3 og BV2)

Allir næmingar á búskapar-, hug- og náttúrubreyt skulu skriva eina breytaverkætlan 3. árið (BV3). BV3 verður skrivað í tvørfakligum samstarvi millum eina høvuðslærugrein á A-stigi og stuðulslærugrein á A-, B- ella C-stigi.

Á fyrireikingarbreytini verður breytarverkætlanin skrivað seinna árið (BV2). BV2 verður skrivað í lærugrein á A- ella B-stigi í tvørfakligum samstarvi við aðra lærugrein á A-, B- ella C-stigi sum stuðulslærugrein. Talan kann eisini vera um tvær stuðulslærugreinir.

Næmingurin skal hava ella hava havt báðar lærugreinarnar á viðkomandi stigi. Við støði í grundaðari skrivligari umsókn frá næmingi, kann leiðari útbúgvingarstovnins gera av, at BV3 verður skrivað í trimum lærugreinum ella bert í einari A-lærugrein.

## Endamálsorðing í kunngerðini

"Endamálið við breytarverkætlanini er, at næmingurin sjálvur skal royna at arbeiða við at fara til botns í og bera fram eitt fakligt greiðsluevni í einum sjálvvaldum øki. Við at seta saman ymiskar tilgongdir og vísindagreinar, skulu næmingarnir vísa, at teir sjálvir eru førir fyri at velja út, nýta viðkomandi tekstgrundarlag og eru førir fyri at gera kritiskar metingar á fakligum grundarlagi og eftir vísindaligum reglum. Arbeiðið við breytarverkætlanini skal menna lestrarførleikar næmingsins, soleiðis at skilja, at hann í skrivligum avriki vísir, at hann megnar at hava yvirlit, viðgera, skipa, taka saman um og bera fram torgreidd greiðsluevni."

## Uppgávustødd

Uppgávan skal vera millum 15-20 síður í vavi[1]. Framsíða, innihaldsyvirlit, keldulisti og møguligar myndir og fylgiskjøl vera ikki tald við. Myndir telja bert við, um tær hava ein virknan leiklut í uppgávuni.

## Vegleiðingin

Uppgávan hjá vegleiðarunum er at geva góð ráð og skilagóðar ábendingar í sambandi við sjálvt valið, at vegleiða í arbeiðinum at avmarka spurdómin, umframt at vegleiða í sjálvari verkætlanini. Vegleiðingin skipast soleiðis:

1. Allir lærarar hava eina innleiðandi fakliga kunning um lærugreinina, so at næmingurin hevur eitt innlit í, hvat eyðkennir júst hesa lærugreinina. Gott er, um lærarin kann vísa á dømi um uppgávuorðingar og svar (verkætlanir) í ymiskum evnum, so at næmingurin kann fáa eitt innlit í tey fakligu krøvini, ið sett verða í lærugreinini.
2. Næmingurin velur evnið og kann koma við uppskoti til, hvørjar lærugreinar kunnu vera viðkomandi fyri evnið. Til hetta endamálið fær næmingurin atgongd til oyðublað, sum hann skal fylla út, og greiða frá síni hugsan um verkætlanina, hvørji faklig mál, hvørji háttaløg og hvørjar bókmentir/keldur, hann hugsar at brúka. At næmingurin nágreiniliga greiðir frá hvørji háttaløg, hann ætlar at brúka, er alneyðugt fyri at áseta høvuðslærugrein og stuðulslærugrein. **Evnisvalið skal verða liðugt í seinasta lagi 4. oktober 2024.**
3. Síðani ásetur skúlin lærugreinar og vegleiðarar. Her verður ansað eftir, at ein skilagóður samanhangur er millum evnið, háttalagið og lærugreinarnar.
4. Tá vegleiðarar eru settir, má næmingurin beinanvegin tosa við teir vegleiðarar, hann hevur fingið, fyri at blíva kunnaður um tey krøv, ið sett vera í høvuðslærugreinini og stuðulslærugreini. Fyri at tryggja dygdargóða vegleiðing, mugu báðir vegleiðararnir vera við í vegleiðingartilgongdini beinanvegin.

---

[1] Ein síða er 2400 sløg (tekin & millumrúm). Vit kunnu eisini siga Times New Roman, fontstødd 12 og 1,5 linjufrástøða.

5. Í næsta parti av vegleiðingini verður evnið ella spurdómurin avmarkaður. Í hesum sambandi verður útgangsstøði tikið í oyðublaðnum, sum næmingurin læt inn, har hann skrivliga lýsti sína hugsan um verkætlanina, greiddi frá fakligum málum, háttaløgum og hvørjar bókmentir/keldur, hann hugsaði at brúka. Í hesum partinum av vegleiðingini skulu báðir vegleiðararnir vera við. Á henda hátt fær næmingurin eina betri fatan av, hvørji krøv vera sett til endaliga verkætlanarsvarið.
6. Vegleiðararnir gera endaligu orðingina til verkætlanina við tí í huga, sum vegleiðararnir og næmingurin hava tosað um í vegleiðingartilgongdini. Hetta merkir, at endaliga uppgávuorðingin tekur atlit at tí, ið næmingurin hevur hugsað um verkætlanina frammanundan, men er kortini háttað soleiðis, at næmingurin ikki kann endaliga skriva partar av uppgávuni frammanundan.
7. Vegleiðarar og nælmingur avtala sínamillum hvussu vegleiðingin framyvir verður skipað. T.d. nær fundir skulu vera, og hvussu næmingurin skal fyrireika seg til hesar fundir. Partar av vegleiðingini kunnu skipast í bólkum, um hetta ber til. Fyri at fáa eina stigvísa framgongd í arbeiðið, skulu vegleiðararnir seta krøv til, hvussu næmingurin skal hava fyrireikað seg til vegleiðingarfundirnar. Talan kann vera um stikkorð, eina synopsu, har næmingurin vísir til tilfar og háttalag, spurdómar osv. Næmingurin skal vera tann aktivi parturin; hann skal orða spurningar, leggja til rættis evnið og finna tilfar, meðan vegleiðararnir skulu vísa á veikleikar við ætlanini og vísa onnur sjónarhorn til uppgávuna hjá næminginum. Partar av hesari vegleiðingini kunnu vera gjøgnum teldupost. Mælt verður til, at næmingar hava stuttar framløgur fyri hvørjum øðrum um verkætlanina. Slíkar framløgur kunnu hjálpa næminginum at avmarka uppgávuna og at lata upp fyri nýggjum sjónarhornum.
8. Næmingurin skal kunna fáa vegleiðing í sjálvari skrivitíðini. Umframt tær avtalur, ið vegleiðarar og næmingar hava gjørt, kunnu vegleiðararnir vísa til ávísar tíðir, har vegleiðararnir eru at fáa fatur á.

## Meting

Verkætlanin verður dømd við einum próvtali, sum byggir á eina heildarmeting, tvs hvussu svarið lýkur málini fyri breytaverkætlanina.

Hesi viðurskifti vera havd í huga, tá ið dømt verður:

- at verkætlanin svarar teimum spurningum, sum settir eru
- at samanhangur er millum verkætlanartíðarskeiðið og vav og góðsku í uppgávuni
- at næmingurin hevur nýtt viðkomandi tilfar
- at evnið er borið fram á nøktandi hátt, og at farið er í dýpdina við evninum
- at nýtta tilfarið er tikið nóg nágreiniliga við í viðgerðini
- at greiðar tilvísingar og skjalfestingar eru nýttar
- at allar keldur eru uppgivnar, og at notur og bókmentalisti eru nøktandi
- at verkætlanin er væl skipað, og at samanhangur er í
- at málburðurin er greiður og neyvur

## Innihald í uppgávuni

- Forsíða og heiti
- Úrtak/"Abstract"
- Innihaldsyvirlit
- Inngangur
- Viðgerð av uppgávuorðingini og spurningum
- Samandráttur/niðurstøða
- Bókmentalisti/keldulisti

- Møgulig fylgiskjøl

## Forsíða og heiti
Forsíðan, sum skúlin letur tær, skal latast inn við uppgávuni. Hon skal vera allarfremst. Á henni stendur

- Navn títt
- floksheiti
- høvuðslærugrein og stuðulslærugrein
- heitið á uppgávuni
- nær uppgávan skal latast inn og
- uppgávuorðingin

Umframt hetta ert tú vælkomin at gera eina framsíðu við mynd, navni og illustratiónum.

## Úrtak/"Abstract"
Í uppgávuni skal vera eitt serligt slag av samandrátti, sum kallast eitt úrtak - á enskum "abstract". Hetta skal í stuttum taka samanum og vísa á teir mest týðandi partarnar í uppgávusvarinum. Teksturin skal kunna lesast sum ein heild og skiljast, uttan at neyðugt er at vísa til uppgávuna sjálva. Eitt úrtak skal vera skrivað á enskum, skal vera millum 10-20 linjur við fyrrnevndu teksteginleikum, og verður sett inn beint eftir heitið ella forsíðuna. Næmingur og lærari mugu seta seg inn í serliga formin, sum eitt úrtak eigur at hava.

Dømi um úrtak:

> This paper analyses Nora, the main character in "A Doll's House" and examines the different facets of her personality. The paper discusses both her businesswoman persona that she has kept secret and the little doll persona that she displays for her father and her husband. Women's social status at the time is described and related to Nora's situation, as well as to that of her friend, Miss Linde. Parallels are drawn to "Forraadt" ("Betrayed") by the Norwegian writer Amalie Skram, and it is demonstrated that there are striking similarities between the dilemmas faced by today's women and the women that lived in the era of the novel. Finally, the paper concludes that Nora despite the persona that she projected to her husband and father for so long, is a strong, flexible, and proud woman.

## Innihaldsyvirlit
Í innihaldsyvirlitinum skulu allir partar í uppgávuni nevnast (kapitul, partur, ser-partur). Her skal lesarin fáa yvirlit yvir uppgávuna, og lættliga finna fram einstakar partar.

GG: Í Word ella øðrum tekstforriti ber til at gera innihaldsyvirlitið, um tú brúkar tær yvirskriftir í rættari raðfylgju, sum eru við í forritinum.

## Inngangur
Her leggur tú títt evni og uppgávuorðingina fram. Ikki brúka eina hálva síðu til at greiða frá, hví tú hevur valt júst hetta evnið, men hugleið heldur fyrst í stuttum um evnið sjálvt, og legg síðani fram, hvussu tú ætlar at loysa spurningarnar, sum uppgávuorðingin setur. Skriva ein samanhangandi tekst her – helst ikki í punktformi. Endurgev ikki uppgávuorðingina beinleiðis í innganginum, men orða teg soleiðis at hon liggur sum grund fyri tí, sum tú skrivar.

## Viðgerð av uppgávuorðingini og spurningum
Tað er í hesum partinum, at tú greinar, metir, diskuterar og perspektiverar. Her skalt tú vísa, at tú dugir at arbeiða fakliga við evninum og tilfarinum, sum tú hevur funnið fram. Tvs at tú skalt vísa, at tú dugir at brúka tekstir, samanbera, endurgeva, stytta, greina, próvføra, diskutera og síggja evnið út frá fleiri sjónarhornum. Her skalt tú arbeiða á ymsum torleikastigum. Tað er eisini her, at møguligt praktiskt/empiriskt arbeiði skal lýsast og brúkast.

## Niðurstøða

Tá ið tú skrivar niðurstøðu, skulu teir spurningar, sum uppgávuorðingin setur, longu vera svaraðir. Niðurstøðan skal vera faklig og taka støði í tilfarinum, sum tú hevur viðgjørt í uppgávuni. Tú skalt við øðrum orðum í stuttum greiða lesaranum frá tí, sum tú ert komin fram til. Tú skalt *ikki* koma við nýggjum tilfari ella nýggjari viðgerð í niðurstøðuni. Tú skalt heldur ikki greiða lesaranum frá, hvat tú sjálv/-ur persónliga hevur fingið burturúr at skriva uppgávuna. Í summum lærugreinum kann vera størri dentur á at hava ein samandrátt saman við niðurstøðuni. Tosa við vegleiðaran um hetta.

## Keldutilfar og ávísingar

Tað er umráðandi, at tín uppgáva er væl skjalprógvað. Hetta er við til at gera uppgávuna fakliga, og ikki bert eitt úrslit av egnari hugsan og meiningum. Tú lænir í høvuðsheitum vitan frá øðrum; tí er alneyðugt, at tú vísir til bókmentir og keldur, soleiðis at lesarin fær at vita, hvaðani tú hevur upplýsingar.

Tað eru ymsar fakligar siðvenjur fyri, hvussu ávísingar verða gjørdar. Vanliga antin við fótnotum ella i klombrum. Tað er týdningarmikið at halda seg til ein viðurkendan hátt at endurgeva, og at brúka sama hátt allan vegin ígjøgnum uppgávuna. Mælt verður til at gera hetta í samráð við læraran.

Harumframt, tá tú brúkar týdningamiklar upplýsingar í uppgávuni – niðurstøður, hagtøl, data, myndir o.a. – skalt tú vísa til júst staðið, haðani upplýsingarnir stava við at seta eina ávísing inn[2]. Tú brúkar ávísingar til:

- endurgevingar (sitat),
- myndir, frymlar, grafar, diagramm o.t.,
- longri úrdráttir úr keldum, og
- tá ið tú vísir til eina teori og styttir/tekur saman um úr kelduni.

Tá ið tú skalt greiða frá fyribrigdum í tekstinum, har tú metir, at teksturin ikki passar inn í júst tann partin, sum tú skrivar, kanst tú seta hetta í eina *fótnotu*. Her kann talan vera um frágreiðing av einum hugtaki, ella viðmerking viðv. einari keldu o.s.f.r. Ger tó hetta bara, tá ið tað veruliga ikki riggar at hava inni í sjálvum tekstinum.

## Endurgevingar

Tá ið tú endurgevur, er týdningarmikið at tú endurgevur fullkomiliga rætt. Endurgevingar skulu merkjast annaðhvørt í skráskrift ella við "gásareygum". Tað lættir um lesnaðin, og skilir tekstin frá tínum egna.

Longri úrdráttir úr keldum kunnu setast inn soleiðis:

> During the Modern English period, the grammar of Standard English has continued to change but at a much slower rate than in the previous centuries. The major changes in Standard English that have taken place reflect the multiple social, scientific, technological and economic developments that the 19th and 20th centuries saw and thus, it is into the English vocabulary that we should look: With imperialism, urbanization and industrialization hundreds of thousands of words were added to the English vocabulary. *Embryology, ohm, watt, joule, chromosome, Jurassic, claustrophobia, silicon, cocaine* – were all new in the 19th century, simply because what they describe was new or hitherto unknown.[3]

Um endurgevingin er stutt, skal hon standa inni í tekstinum í gásareygum: "Some of these interact directly with the texts and exercises, while others illustrate and comment on texts or themes." [4]

---

[2] Hetta er ein fótnota. Tað er ein máti at gera ávísingar. Her skal sjálv keldan standa við heiti og síðunummari. Tær nágreiniligu upplýsingarnar um keldunafær mann í keldulistanum aftast.

[3] Finderup, *Worlds of English*, s 123

[4] Ibid, s 129

## Myndir

Tú mást altíð viðmerkja sambandið millum myndina og tekstin. Um ikki, er hetta ikki áhugavert í uppgávuni. Tú mást eisini vísa til keldur í sambandi við myndir. Um tú sjálv/-ur hevur gjørt myndina, er neyðugt, at tú viðmerkir hetta.

## Keldu- og bókmentalisti

Alt tilfarið, sum nýtt verður í uppgávuni, verður sett upp í raðfylgju eftir bókstavarað á henda hátt: Rithøvundaeftirnavn, -fornavn: *heiti*, ”navn á kapittuli úr verkinum”, útgáva, (møguliga útgávustað), útgávuár. Sí dømi niðanfyri um, hvussu víst verður til bøkur, tíðarrit, filmar, sendingar, heimasíður osfr.

GG! Tá ið tú vísir til heimasíður, skal tú eisini nevna, hvat heimasíðan er um, og møguliga útgevaran, og dagfesting nær tú hevur tikið tilfarið niður.

## Bókmentalisti - dømi:

**Bøkur:**

Finderup, Anne Mette, Fog, Agnete: *Worlds of English*. Systime, 2015.

Sobel, D.: *Manden der målte længdegraden*. Valby: Borgens Forlag A/S. 1997. Tíðarrit:

Lodish, Harvey F. og James E. Rothman: “The Assembly of Cell Membranes””. I: *Scientific American* Vol. 240 1997.

**Filmar:**

Longo, Robert: Johnny Mnemonic. Fremtidens mest jagede menneske. (Uppr. am.) Alliance/MDP 1995.

**Sjónvarpssendingar:**

Merkistein, Súni: “Minnist tú enn – 3 partur”. Sjónvarpssending, Kvf , 8. okt. 2014. Framleitt 2014.

**Heimasíður:**

“Celestial Navigation Fundamentals”. Útgáva: Omar F. Reis.
http://www.tecepe.com.br/nav/inav_c11.htm - Vitjað: t. 13.02.2013 (Internet). “Kvadrantens Historie”. Útgáva: geomat.

http://www.geomat.dk/opdagelser_og_navigation/instrumenter/kvadrant/kvadrant_h istorie.htm Vitjað t. 14.02.2013 (Internet).

# Áðrenn tú letur inn

Umráðandi er, at uppgávan verður rættlisin. Best er, at tað verður gjørt í fleiri umførum. Fá onkran at lesa uppgávuna so tú fært tryggjað tær, at onnur bæði fata, hvat tú hevur skrivað, og at stavivillur og málsligar villur verða rættaðar. Somuleiðis eigur tú at kanna, at síðutøl, mynda- og talvutøl o.a. formalia eru røtt.

# Tíðarætlan (í høvuðsheitum)

4. oktober 2024 – seinasta freist at lata evnisvalið inn

11. oktober 2024 – Evnisvalið staðfest

6. desember 2024 kl. 15.25 – uppgávuorðingin útflýggjað, og skrivitíðarskeiðið byrjar.

20. desember 2024 kl 15:25 – seinasta freist at lata BV3 og BV2 inn.